# Eitt spilt eftirmælið

**FÓTBÓLTUR**

**Mest umtalaðu menninir í Onglandi seinastu vikuna eru SkySports-vertirnir, Richard Keys og Andy Gray. Teir eru báðir fortíð í SkySports eftir 20 ár sum oddamenn fyri Premier League fótbólti í enskum sjónvarpi orsaka av ósømuligum atburði og málburði móti kvinnum. Sosialurin hevur hugt eitt sindur nærri at hvørjir teir báðir eru**

Tróndur Arge - Liverpool



*Fyrrverandi SkySports frásøgumenninir, Andy Gray og Richard Keys*

Andy Gray er skoti og er føddur í 1955 í Glasgow. Hann hevur spælt fótbólt í bæði Skotlandi og Onglandi, áðrenn hann gjørdist víðagitin fótbóltsviðmerkjari hjá SkySports. Hann byrjaði sína yrkisleið í fótbólti í 1973 í Dundee United sum framherji, har hann skoraði 46



*Andy Gray í sínum hárføgru Wolverhampton døgum*

mál í 62 dystum. Í 1975 skifti hann til Aston Villa, ið júst vóru fluttir upp í bestu deildina í Onglandi. Hann gjørdist toppskorari í fyrsta kappingarárinum í Aston Villa. Árið eftir skoraði hann ikki minni enn 29 mál. Hetta árið var hann kosin til ársins unga leikara og ársins leikara. Tað var fyrstu ferð, at nakar leikari var kosin til bæði tvey sama árið. Bragdið var ikki endurtikið fyrr enn 30 ár seinni, tá ein ávísur Cristiano Ronaldo ráddi fyri borgum í Manchester United.



*26 ára gamla Sian Massey, kom annars væl frá uppgávu á Molineux*

## Onkur burdi fari oman og lært hana um rangstøðu

ANDY GRAY, TÁ HANN FÆR AT VITA, AT TAÐ ER EIN KVINNULIGUR LINJUVERJI TIL DYSTIN MILLUM WOLVERHAMPTON – LIVERPOOL

### Lagnunnar speiðsemi

Í 1979 skifti Andy Gray til Wolverhampton fyri £1,5 millión, sum var bretskt met. Her var Andy Gray við at vinna lítlu steypakappingina í Onglandi, League Cup, og hann fylgdi liðnum niður í næstbestu deildina, hóast hann hevði eitt tilboð frá Manchester United.

Meðan Andy Gray var í Wolverhampton, segði hann við enskar miðlar, at hann kundi væl hugsa sær at enda sína yrkisleið á Molineux, sum er heimavøllurin hjá Wolverhampton. Lítið visti hann, at tann dreymurin gjørdist veruleiki, tá hann góð 30 ár seinni var koyrdur frá sum viðmerkjari, eftir at hann til dyst millum Wolverhampton og Liverpool vísti ósømuligan málburð mótvegis kvinnuligum linjuverja.

Í 1983 skifti Andy Gray til Everton og gjørdist hann ein væl dámdur leikari har. Men tvey ár seinni keypti Everton Gary Lineker og Andy Gray fór aftur til Aston Villa. Hetta var byrjanin til enda hjá Any Gray sum fótbóltsspælara. Hann gavst at spæla í 1990 og gjørdist partur av venjaratoyminum hjá Sheffield Wedensday.



*Kappingarárið 1976-77 leikti Andy Gray við Astin Villa, og bleiv valdur til »Young Player of the Year«*

### Keys og Gray møtast

Í 1992 gjørdist Andy Gray viðmerkjari hjá SkySports, sum kolvelti enskan fótbólt, tá Premier League var stóvnað. Richard Keys er føddur í 1957 í Coventry og hevur arbeitt í sjónvarpsheiminum tað mesta av síni yrkisleið. Hann var vertur fyri sending á ITV-rásini, umframt at hann var frásøgumaður til fótbóltsdystir. Í 1990 skifti Richard Keys



*John Petersen skorar móti Skotlandi á Svangaskarði*

## Daft little ground, silly game, fuck off

RICHARD KEYS UM DYSTIN MILLUM FØROYAR OG SKOTLAND Í 2007

til nýstovnaði SkySports rásina, har hann í samfull 20 ár hevur verið ímyndin av fótbóltinum hjá teimum. Í 2002 hevði Richard Keys verið vertur fyri 1.000 dystum á SkySports

### Richard Keys yvirtalar seg

Undan gøluni um kvinnuliga linjuverjan og varaforkvinnuna í West Ham, hevði Richard Keys longu yvirtala seg í nøkrum førum. Í 2007 var hann lítið blíður um Svangaskarð og dystin millum Føroyar og Scotland. Í fjør spilti hann Theo Walcott út, meðan Arsenal spældi móti Barcelona. SkySports kom við eini umbering fyri viðmerkingarnar um Svangaskarð og segði at Richard Keys hevði verið til arbeiðis í seks tímar og var troyttur, tá hann yvirtalaði seg. Tað vóru serliga skotar, ið kendu seg raktar av viðmerkinginum, men SkySports vóru skjótur at vísa á, at viðmerkingarnar vóru beindar móti Svangaskarið!

### Líkini bólta úr skápinum

Eftir gøluna um ósømuliga atburðin og málburðin móti kvinnum, sum teir báðir høvdu framt »off-air,« standa núverandi og fyrrverandi starvsfólk í kø fyri at fortelja sína søgu. Fleiri kvinnur hava verið í bretskum miðlum og fortalt søgur um atburðin hjá Andy Gray og Richard Keys á arbeiðsplássinum. Felags fyri allar er, at tær kendu seg illa viðfarnar av teimum báðum vertinum.

SkySports valdi at koyra Andy Gray eftir at tað komu fleiri sjónvarps- og ljóðbrot fram, har hann vísti ósmøuligan atburð og málburð. Richard Keys valdi stutt eftir at fara frá sjálvur.

Eftir 20 ár sum stjørnu-vertir fyri topp fótbólti á SkySports, eru Richard Keys og Andy Gray nú arbeiðsleysir og teirra eftirmælið hevur fingið ein stóran svartan plett, ið aldrin kann vaskast av aftur.

trondur@sosialurin.fo